# Niðurflyting hóttir LÍF



Einki tykist at bera til í løtuni hjá silvurvinnarunum tey bæði seinastu árini

*2. deild: Nýggja venjaraparið hjá LÍF fekk ikki eina ynskibyrjan, men fekk tó eitt stig burturúr dystinum móti Royn, sum nú aftur er botnlið*

Stefan í Skorini

Berg Vatnhamar og Jógvan Júst Olsen hava tikið yvir sum venjarar hjá LÍF, nú Hans Mourits Foldbo fer av landinum. Nýggju venjararnir megnaðu tó ikki at fáa fulla úrtøku burturúr botndystinum móti Royn, og LÍF er nú bara eitt stig frammanfyri niðasta liðið, sum er Royn. Hetta var tó ein lítil uppreisn hjá LÍF eftir 5-0 avsmurningin móti NSÍ seinasta vikuskiftið.

LÍF hevði yvirvágina í fyrra hálvleiki, men hóast tað so vóru tað suðuroyingarnir, sum løgdu seg framum. Spælandi venjarin hjá Royn, Zoran Mancic, royndi seg við skoti, sum fór dygst úti við stongina og í málið. Hetta var tá bara fimm minuttir fóru farnir. Hetta var eisini stórt sæð tað, sum hvalbingar høvdu at bjóða uppá fyri steðgin, men tað var eisini nóg mikið hjá teimum. LÍF hevði bóltin meira í fyrra hálvleiki, men hóast leikligu yvirvágina høvdu teir ikki nógvar málmøguleikar, og tá liðini fóru til hálvleik var Royn frammanfyri 1-0.

Eftir steðgin sendi LÍF nógv fólk fram á vøllin fyri at fáa tað útjavnandi málið, og tað lá eisini í luftini, at leirvíkingar fóru at skora fyrr ella seinni. Tað gjørdist eitt øgiligt trýst á Royn málið, men einki kom burturúr, hóast fleiri málmøguleikar. Royn hevði eisini ein møguleika í seinna hálvleiki, men Allan Mikkelsen fekk einki burturúr, tá hann kom at standa væl fyri.

Tá tíggju minuttir vóru eftir, fekk heimaliðið at enda mál. Hornaspark varð sent innfyri, og Sigfríður Olsen sendi bóltin í netið til endaliga úrslitið 1-1. Áðrenn tað hevði Páll Suni Dam havt eitt dundrandi langskot á tvørstongina, sum tó fór útaftur í spælið. Eftir útjavnandi málið hevði Signar á Reynatrøð ein góðan møguleika at skora vinnandi málið, men hann sendi sítt skot omanfyri, tá hann kom at standa fríur beint uttanfyri málteigin.

Hesin dysturin hevði stóran týdning fyri niðurflytingingarstríðið, tí hesi bæði liðini stríðast í botninum saman við KÍ, GÍ og HB, sum eisini eru kandidatar at flyta niður. LÍF er tvey tey seinastu árini endað á øðrum plássi í 2. deild, men báðu ferðina hevur liðið tapt fyri Sumba í dystinum um at sleppa upp í 1. deild. Í ár er tó øðrvísi, og nú hugsa leirvíkingar mest um at verða verandi í 2. deild.

**LÍF-Royn 1-1(0-1)**
0-1: Zoran Mancic
1-1: Sigfríður Olsen

# Palli var ikki nøgdur

*Fríggjadagin spældi føroyska A-landsliðið í hondbólti venjingardyst ímóti einum pressuliði sum liður í fyrireikingum til eina kapping í Danmark í seinni í vikuni*



Stefan í Skorini

A-landsliðið vann dystin 23-18, eftir at pressuliðið hevði verið frammanfyri 12-11 eftir fyrra hálva tíman.

Liðini fylgdust í fyrra hálvleiki, og ongantíð vóru meira enn tvey mál á muni. Eftir fyrstu løtuna var landsliðið tvey mál frammanfyri, og vísti eisini tað betra spælið eftir fyrstu minuttirnar.

Pressuliðið menti seg tó, sum hálvleikurin leið, og móti endanum førdi pressuliðið 11-9. Tá hevði pressuliðið hjá Kára O. Durhuus eisini fleiri møguleikar at leggja seg fleiri mál framum. Pressuliðið misnýtti møguleikarnar, og ístaðin vóru tað Áki Olsen og Hans Áki Dahl Christiansen, sum javnaðu til 11-11. Beint undan steðginum legði Áki Mørk tó pressuliðið framum aftur, tá hann lobbaði bóltin uppum málverjan í seinasta álopinum í fyrra hálvleiki.

Tá liðini komu aftur á vøllin í seinna hálvleiki var eingin ivi um, hvat av teimum hevði teir betru spælararnar og orkuna at vinna dystin. Fyrstu minuttirnar gekk tó javnt á, men tá hálvleikurin varð hálvrunnin tók landsliðið yvir og vann eisini sannførandi at enda.

Hevði tað ikki verið fyri fleiri góðar bjargingar hjá Óla Kristian Djurhuus í málinum hjá pressuliðnum, so hevði sigurin verið enn størri.

Áki Olsen var toppskjútti hjá landsliðnum við sjey málum, meðan Heini Joensen og Hans Áki Dahl Christiansen skutu fýra mál í part. Hjá pressuliðnum var Halgir Dahl Olesen toppskjútti við fýra málum, meðan Petur Martin Johansen og Annfinn N. Debes skutu trý mál í part.

**Ikki í venjing**

Tað var týðuligt, at spælararnir ikki eru í venjing enn. Nógv mistøk vórðu gjørd, sum ikki verða at síggja seinni í vetur, tá spælararnir veruliga eru komnir í venjing.

- Eg gangi ikki so høgt uppí úrslitið, men tað, sum eg serliga eri misnøgdur við er, at verjan ov passiv og ikki nóg kontant í sínum spæli, og mótstøðuliðið slapp tí alt ov lætt til møguleikar, sigur Palli Joensen, venjari hjá A-landsliðnum.

- Hetta verða vit revsaðir fyri, tá ið vit møta sterkari mótstøðuliðum niðri í Danmark, sigur Palli.

Spælararnir vóru ikki í dystarvenjing, og Palli Joensen var eisini misnøgdur við allar teir brendu møguleikarnar.

- Eg haldi eisini, at vit brenna ótrúliga nógvar upplagdar møguleikar, og í fyrra hálvleiki lá prosentið niðri á einum triðingi, og tað er alt ov høgt, sigur Palli.

Palli segði eisini, at hetta er ein afturvendandi trupulleiki, at spælararnir brenna so nógvar møguleikar.

Stórur saknur var í Inga Olsen, sum ikki var við móti pressuliðnum. Hann hevur stóran týdning fyri bindandi spælið á landsliðnum, og hann saknaði Palli Joensen eisini.

A-landsliðið fór avstað mánadagin, og kappingin byrjar 25. og endar 27. august. Kappingin nevnist Hummel Cup, og hon verður í Aalborg. Kvinnulandsliðið er eisini við á ferðini niður til Aalborg. Áðrenn kappingina skal landsliðið spæla venjingardystir móti tveimum liðum niðri í Danmark.

Kappingin í Aalborg er ein liður í fyrireikingunum til HM undankappingar dystirnar hjá kvinnum móti Svøríki í desember og EM undankappingar dystirnar hjá monnum móti Rumenia, Litava og Sveis. Landsliðið skal í minsta lagi spæla seks venjingardystir áðrenn EM dystirnar.

# Guttorm Sørensen FM-vinnari í hálvum marathon



*21 rennarar høvdu hættað sær undir tann 21 kilometra langa teinin, og ikki óvæntað vann Guttorm Sørensen frammanfyri Signar Røsvig*

Stefan í Skorini

Guttorm Sørensen tók seg 10 sekund framum Signar Røsvig, tá bara fimm kilometrar vórðu lagdir afturum bak, og hesa leiðsluna helt hann heilt á málstrikuna. Guttorm ognaði sær sostatt føroyameistaraheitið, 8 sekund frammanfyri Signar á øðrum plássi.

Dystin um triðja plássið vann Cecil Weihe frammanfyri Sølva Reinert Hansen og Niels Jákup Jakobsen, sum kom inn á fjórða plássi. Cecil legði hart út, og hann megnaði at halda fast um triðja plássi.

Hjá kvinnunum vann Rigmor N. Joensen ikki óvæntað. Bara tvær kvinnur luttóku, og hin var Brindis Weihe. Tíðin hjá Rigmor var hálvanannan minutt betri enn besta tíðin á oyggjaleikunum seinast. Bæði Rigmor og Guttorm vunnu eisini føroyameistaraheitið í hálvum marathon í fjør.

Henda kappingin var samstundis ein partur av Daewoo Marathon kappingini, har luttakararnir renna marathon tilsamans, um teir fullføra allar kappingarnar. Vinnarin verður so tann, ið hevur nýtt minst tíð til samlaða teinin.

F. M. Í Hálvum Marathon í Havn 19 august

Menn

1. Guttorm Sørensen Treysti 1 t. 16 min. 18 sek.
2. Signar Røsvig Bragdið 1 t. 16 min. 26 sek.
3. Cecil Weihe Bragdið 1 t. 20 min. 45 sek.
4. Niels Jákup Jakobsen 1 t. 22 min. 51 sek.
5. Sølvi Reinert Hansen 1 t. 24 min. 2 sek.
6. Sigurð Justinussen 1 t. 25 min. 22 sek.

Kvinnur

1. Rigmor N. Joensen Bragdið 1 t. 24 min. 49 sek.
2. Brindis R. Weihe Bragdið 2 t. 4 min. 10 sek.



**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3060

**Navn:** Sp/f Arabo Consultants
**Adressa:** 415 Oyrareingir

**Kommuna:** Kollafjar›ar Kommuna
**Stovningardato:** 12.08.2000
**Vi›tøkudato:** 12.08.2000
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** Thomas Arabo, 415 Oyrareingir, Jan Arabo, Landavegur 115, 3th., 100 Tórshavn og Anna Arabo, 415 Oyrareingir.
**Nevnd:** Thomas Arabo, 415 Oyrareingir (forma›ur), Anna Arabo, 415 Oyrareingir og Jan Arabo, Landavegur 115,3th, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Anna Arabo, 415 Oyrareingir.
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur tekna› av stjóranum ella nevndarformanninum.
**Grannsko›ari:** : P/F Rasmussen & Weihe, á Gla›sheyggi, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 12.08.2000 - 31.12.2000
**Endamál:** Endamál felagsins er at veita rá›geving, keyp og sølu og anna› virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 18. august 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. P/F 2867, **P/F Fodan, 100 Tórshavn.**

**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Eivind Sundstein, Sprogøvej 7, DK-2000 Frederiksberg.
Innkomin sum stjóri: Jógvan Sundstein, Skáki› 9, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 18. august 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3061

**Navn:** Sp/f Ergo Design
**Adressa:** Tinghúsvegur 40, 100 Tórshavn

**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 10.08.2000
**Vi›tøkudato:** 10.08.2000
**Kapitalur:** Kr. 90.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kontant kr. 90.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** Heini Weihe, Tjarnardeild 19, 100 Tórshavn, P/F Formula.fo, Sti›jagøta 5 og 11, 100 Tórshavn og Ergonomic Products Aps, Roholmsvej 15, DK-2620 Albertslund.
**Nevnd:** Kim Morgan Ejdesgaard, Spógvavegur 44, 100 Tórshavn (forma›ur), Heini Weihe, Tjarnardeild 19, 100 Tórshavn og Poul Davidsen, Ertemarken 29, DK-2860 Søborg.
**Stjórn:** Heini Weihe, Tjarnardeild 19, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur tekna› av stjóra, nevndarformanni ella tveimum nevndarlimum.
**Grannsko›ari:** : Sp/f KPMG, statsaut. Revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 10.08.2000 - 31.12.2001
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka møblasølu og anna› starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 18. august 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. P/F 289, **P/F Grannsko›aravirki› Inpact, statsaut. revisorar, 100 Tórshavn.**

**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Jógvan Sundstein, Skáki› 9, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 18. august 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3026, **Sp/f 26, juni 2000, 100 Tórshavn.**

**Vi›tøkur broyttar:** 05.07.2000.
**N‡tt navn:** Sp/f Bor›oyarnes
**N‡ggj adressa:** Víkavegur 105, 700 Klaksvík
**Kommuna:** Klaksvíkar Kommuna
**Nevnd:**
Farin úr nevndini: Annfinn V. Hansen, á Fløtum, 180 Kaldbak (forma›ur).
Innkomin í nevndina sum forma›ur: Poul Martin Rasmussen, Víkavegur 105, 700 Kalskvík.
**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Jóannes Madsen, Heygsvegur 34, 100 Tórshavn.
Innkomin sum stjóri: Jón Nolsøe Olsen, 530 Kambsdalur.

Skráseting Føroya tann 21. aaugust 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2515, **Sp/f Málingabú›in, 600 Saltangará.**

**Vi›tøkur broyttar:** 22.06.2000.
**N‡tt navn:** Sp/f Petur Gaardlykke
**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Fró›i Sigvardsen, Onnugøta 3, 188 Hoyvík.
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur bundi› av stjóranum.
**Grannsko›ari:**
Farin frá sum grannsko›ari: Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Innkomin sum grannsko›ari: P/F Rasmussen & Weihe, á Gla›sheyggi, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 18. august 2000

Kristin Balle

---


## Almenn móttøka

í sambandi við at

**Hildibjart Johansen,**

stjóri á Lønjavningarstovuni, hevur havt 40 ára starvsdag verður móttøka í Fiskimálastýrinum,

**hósdagin 24. august 2000 millum kl. 14.00-16.00.**

Øll eru vælkomin.

**Fiskimálastýrið**



## Handilshøli til leigu

**Eitt tað best liggjandi handilshøli í miðbýnum er til leigu. 50 fermetrar uppi á aðru hædd yvir mótahandlinum MILLENNIUM, har sølubúðin hjá Suðuroya Ullavirki "SIRRI" hevur hildið til seinastu tíðina.**

**Vit koma at hava felags inngongd umframt aðrar facilitetir.**

**Hevur tú hug og hegni at royna nakað spennandi í góðum, hugnaligum og ungdomiligum umhvørvið, so ring, skriva ella støkk inn á gólvið hjá okkum og tosa við Beintu.**



*MILLENNIUM er ein nýmótans handil, sum selur mótaklæðir til kvinnur. Handilin liggur sera væl fyri á fyrstu hædd í húsinum "hjá Jóan Jakku" í Vágsbotni, við útsýni yvir Nólsoyar Páll og Vestaru Vág. Sera góðir parkeringsmøguleikar eru við handilin.*

MILLENNIUM

*VÁGSBOTNUR • TEL 31 80 80*


www.sosialurin.fo